# Fjølmiðlafólk á Havnargøtum og seiðurin á Galvinum

JÓGVAN VIÐ KELDU



**Tørvandi trúvirði í føroyska fjølmiðlaheiminum og at gáttin er hækkað, so føroysk fjølmiðlafólk ikki fáa sersømdir á Danmarks Journalisthøjskole, er veruleiki, støða má takast til.**

Ikki so sjáldan og kanska serliga seinastu tíðina hava nógvar atfinningarsamar røddir verið frammi móti føroyskum fjølmiðlum og fjølmiðlafólkum.

Vit hava eisini sæð, tað sum sjáldan hendir, og sjáldan eigur at henda, at fjølmiðla-fólk, tíðindaleiðari og eg haldi, at ikki færri enn eini trý í einum syfti úr Kringvarpi Føroya gjørdu eina roynd at fáa sær rættvísi millum Føroya fólk. Eisini ein blaðstjóri við lograndi hala kendi seg noyddan at geva Amnesti International eina umbering, tí hann kanska hevði verið ovurfegin í eini oddagrein í blaðnum um, at Saddam Hussain verður tikin av døgum. Bert fyri at taka okkurt hissini úr rúgvuni.

Spurningurin er, um vit eiga at seta so høg krøv til okkara fjølmiðlafólk, sum eru skapt út av 48túsund borgarum. Her er ikki serliga nógv at velja burtur úr.

Eisini nú vit uppliva, at journalistháskúlin í Århus krevur hækkaða gátt, og vandi sostatt er fyri, at føroyingar ikki bara við sersømdum fáa tvey sjálvsøgd fríplláss.

**Fjølmiðlar ikki trúverdir**

Fyri átta árum síðani kom ein av "Fremads debatbøger", skrivað av Peter Bro, "Journalisten som aktivist".

Hann sigur m.a.: "Fjølmiðlarnir hava trupulleikar í dag. Seinastu tíggju árini er upplagið fallið javnt, bløð hava latið aftur, og fjølmiðlafólk verða nevnd sum ein av landsins minst trúverdu vinnubólkum".

Soleiðis hevur ljóðað í USA fyri 25 árum síðani, sum í Danmark ljóðaði fyri átta árum síðani og sum føroyingar nú eru vaknaðir við kaldan dreym.

Danir tóku hetta upp, játtaðu pening til, at Odense Undiversitet og RUC kundu byrja fjølmiðlaútbúgving, sum gjørt var í USA longu í 1990.

Hóast eg nevndi, at spurningur er, hvussu nógv kann verða kravt av okkara fjølmiðlafólkum, so tykist fjøldin í føroyska fjølmiðlaheiminum at reka í somu ættir, hvørja ferð okkurt er á vási. Ofta síggja vit, at longu áðrenn málið hevur tikið veruligt skap, at so gott sum allir hava tikið støðu – og somu støðu, uttan at kenna málið.

**Sprakla í villskapi**

Hetta minnir meg ikki sørt um, tá vit báðir beiggjarnir vóru smádreingir onkuntíð vóru á Galvinum saman við pápa okkara og dyrgdu eftir seiði í sterkum vestfalli.

Vit sótu og bíðaðu. Jú so knappliga, kom seiðurin upp, kastaðist, øll torvan fór sama veg, spraklaði eins, inntil hon hvarv aftur. Løtu seinni, kom torvan upp í øðrum staði, fór sama veg, kastaðist eins í ávísum villskapi, fyri síðani at kava.

Flestu føroyingar vilja helst geva mær rætt í, at soleiðis tykist føroyski fjølmiðlaheimurin at hátta sær.

**Insinueraður rasist**

Tá eg varð settur Landsstýrimaður í m.a. útlendingamálum, høvdu málini framman-undan verið skilaleyst avgreidd. Fleiri ítróttamál vóru ólógliga avgreidd. Fútin mátti veruliga í arbeiðsklæðini. Onnur arbeiðsloyvi við asiatum, sum livdu undir øllum lágmarki og tí ólógliga, vórðu meldað til løgregluna. Fútin hevði úr at gera við at senda hesi ólógligu av aftur landinum.

Hetta lívið skuldi halda uppat, og eg má siga, at eg ídag fegnist um, at bæði eg og mítt ráð veruliga tóku málið upp í álvara. Onkur tyktist kanska fáa eina ómilda viðferð, tað hendir tíverri, men helt hetta lívið fram, komu vit út í upp aftur størri trupulleika, og sum fútin segði: " Fáa tit ikki skil á hesum, sleppi eg endanum". Hetta var hóðast alt danskt mál.

Orsøkin til at eg nevni hetta aftur, er viðgerðin fjølmiðlarnir einstáttað góðu málinum. Enntá var oddagrein so mikið ólátað, at hon meir enn insinueraði meg at vera rasist.

Sjálvandi vóru fleiri av fjølmiðlafólkunum inhabil, og tí slettis ikki áttu at havt sloppið at viðgjørt hesi mál í okkara almennu fjølmiðlum. Men vit eru so fáment og mong eru so nógva staðni, at tað ikki er so lætt.

**Fjølmiðlarnir ongan áhuga**

Ferð eftir ferð beyð Innlendismálaráðið fjølmiðlunum at koma til fyrilestrar, fyri at fáa veruligt innlit í útlendingamálið, sum er danskt mál, og sum eisini vórðu viðgjørd í vaksandi arbeiðsloysi.

Tað var so gott sum heilt uttan áhuga, tí stuttligari var at koma við egnum metingum og meiningum, sjálvt um tær ikki vóru í tráð við veruleikan. Hesir meta seg jú vera fjórða statsmaktin.

Sum seiðurin á Galvinum, so komu torvurnar upp, øll søgdu tað sama, spraklaðu í villskapi fyri síðani at kava og koma uppaftur í øðrum plássi. Og øll so samfeld.

Føroysku fjølmiðlarnir hava stórar trupulleikar, í mongum førum ótrúverdir. Nú gáttin er hækkað á Danmarks Journalisthøjskole, so føroyingar ikki fáa sersømdir at sleppa inn, verður spennandi at fylgja við, um broyting kemur í. Eingin fjølmiðlaábyrgdara-lóg fer at broyta trúvirðið, men bert broyttur hugburður, og her skal nógv broytast.

At enda haldi eg, at eg fari at gera vart við, nú fjølmiðlafólk dyrgja eftir og strongja á, fyri at fáa journalistútbúgving í Føroyum, fari eg at biðja politikarar ikki lata seg taka av fótum og leypa framav. Vit hava meiri enn nóg mikið av indavl í føroyska fjølmiðlaheiminum. – Danir fara eitt nú til Bretlands at lesa.

# Tá Breckmann tók tingskipanina av ræði og hjálpti Eidesgaard

ÁKI ANDREASEN

**Fríggjadagin í farnu viku samtykti í løgtingi, at Jóannes Eidesgaard kortini skal svara skrivligum spurningi frá Høgna Hoydal, sum hann, við hjálp frá Óla Breckmann sum sat í løgtingsformanssessinum, í fyrstu atløgu snúði sær undan at svara, tá teir vóru settir munnliga.**

Hósdagin 8. november var løgmaður í tinginum. Formaður Tjóðveldisfloksins hevði m. a sett løgmanni tveir spurningar um avleiðingar av skatta- og sosialpolitikkinum hjá samgonguni.

**Løgmaður kroystur upp í ein krók**

Løgmaður trein á røðarapallin, og í ein illsintisrøðu, sum bar brá av einum kroyststum løgmanni, snúði hann sær undan at svara spurningunum.

Um hann í síni javnaðarsál hevur ilt við at greiða Føroya fólki frá, hvørjar avleiðingarnar eru, tá skatta – og sosialpolitikkur samgongurnar fer at merkjast millum landsins borgarar, er sjálvandi ilt at meta um, men løgmanssessurin er helst somikið fjálgur, at útsølan av javnaðarhugsjónini er eitt rímiligt gjald. Hin møguleikin er sjálvandi, at løgmaður ikki – uttan víðari er førur fyri at greiða frá hesum avleiðingunum, um so er hevur hann sum samgonguleiðari ein trupulleika.

**Bjargingarkransurin frá Breckmann**

Óli Breckmann, sum sat í formanssessinum í tinginum hesa løtuna, gjørdi skjótt av, tá løgmaður var liðugur at niðurgera bæði spyrjarin og tingskipanina sum heild, tók løgtingsformaðurin yvir og gjørdi ikki matari enn at taka spyrjaran av ræði, tók setta spurningin av skránni, í meðan hann skírdi tingarbeiði at vera "sirkus" og "glantrileik".

Tað er týðuligt at hetta var avtalað spæl millum Óla Breckmann og løgmann.

**Virðing fyri tinginum?**

Hendingin var ein skamblettur fyri tingarbeiðið – men Jóannes Eidesgaard, løgmaður hevur áður víst, at tá til skarpskeringar kemur, er virðingin fyri tingarbeiðinum so sum so, og serliga um arbeiðið og innihaldið ikki heilt gongur soleiðis sum løgmaður vil hava tað. At Óli Breckmann stuðlar undir er kanska heldur ikki so løgið, tí maðurin hevur eisini víst, at hann metir tingsins røðarapall at vera sítt egna talurør út til allar føroyingar, og so kann tað gera tað sama hvat hann velur at siga – alt ber til.

**Løgmaður skal svara**

Tá spurningurin bleiv settur skrivliga, samtykti løgtingi at løgmaður skal svara. Møguliga fyri at byrgja upp fyri svarinum upp á klaguna frá Tjóðveldisflokkinum, men greitt er, at løgmaður nú hevur allar møguleikar fyri at fáa eitt svar frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, og svarið kann so eisini undirbyggjast við eitt sindur av "góðum borgarligum" skatta – og sosialpolitikki frá Fólkaflokkinum.

# Bert nakrir tankar

MALMBERG D. OLSEN



Vit liva í eini tíð har krøvini til samfelagið eru ovurhondsstór ein má undrast á, at ein fiskivinnutjóð við 48.000 túsund íbúgvum kann klára, at uppi halda ein so høgan livistandard, sum vit hava her á Føroya landi. Í løtuni er orðaskifti um skattalættar og pansiónir í tingsalinum, hettar er nakað sum viðkemur okkum øllum á ein ella annan hátt so ella so.

Eg eri frá 43 árganginum vaks upp í eini tíð har ansingarstovnar ikki vóru uppfunnir. Hvør skúladrongur kundi arbeiða alt tað hann hevði hug til, tað var ein frøði at koma úr skúlanum og tveita skúlataskuna av sær og fara inn á Hulk at arbeiða sild, ella oman á Sjóvarhøvda ella út á Heygstøð at breiða fisk út til turkingar, landa skip sum komu at leggja fiskin upp, alt hettar var ein við til, sum smádrongur í bygdasamfelaginum og ikki at gloyma trolararnar sum løgdu veiðuna upp á Skála, jú tá vóru boð eftir skúladreinginum.

Hettar er alt ein farin tíð skúladreingirnir hava ikki henda møguleika í dagsins samfelag, krøvini til ungdómin at nema sær útbúgving er nógv størri í dag og ein verður sitandi á skúlabeinki langt upp í árini og tað at verða fiskimaður verður ikki mett nakað serligt longur, men tað var tað ein sá fram til í mínum uppvøkstri, at sleppa at mynstra umbor eitt skip so broytast tíðir.

Samfelagið Føroyar rópar eftir arbeiðsmegi, serliga innan fiskaarbeiði er brúk fyri nógv fleiri hendrum og talan er um at innflyta arbeiðsmegi. Eg ivist onga løtu í, at tað ganga nógvir menn og kvinnur runt um í okkara landi, sum eru komin til pansións aldurin, men gott kundu hugsa sær at arbeitt framvegis, men vegna forðingar í pensiónsloftinum loysir hettar seg bara til tú hevur nátt hettar lofti so mást tú bara seta teg hendur í favn tí tú verður straffaður um tú fert forbí hettar lofti.

Góðu politikarar her er nakað hjá tykkum at taka fatt uppá og fáa broytt sum skjótast, einki eiður at forða manni ella kvinnu í at arbeiða,uttan ein skerdur arbeisførleikið. Arbeisgleðin hjá tí einstaka borgaranum má ikki skerjast vegna skattaloft og avgjøldum av øllum møguligum sløgum.

Vit kunna til dømis nevna egningaskúrðarnar runt um í útiróðraumhvørvinum, har pansinonistarnir gera eitt stórt arbeiði við at halda útiróðrinum í gongd, haraftrat hevur tað ein stóran sosialan týdning at hava egningarskúrar at fara til, tað gevur daglidegnum innihald og meining so er tað eisini tann fordeilur, at tú kemur og fert, sum tú hevur evnir til. Men her kemur aftur hettar ólukku lofti sum tú rennur teg í móti í skattaskipanini hettar er púra meiningsleyst í mínari verð, ístaðin skuldi ein betalt skatt av tí ein forvinnur og verði giraður til at arbeitt eftir evnum, tað vildi givið nógvar krónur meir til samfelagið í skatti, er tað ikki tað vit hava brúk fyri ?

Hoyrdi mann einafer siga, at hann hevði ongantíð verði so illa við, sum tann dagin hann fekk bræv frá arbeisgevara um, at hann var fallin fyri aldursgreinsuni og av teirri grund mátti gevast í einum arbeiði, sum hann var ógvuliga glaður fyri. Hesin merkiligi varðin á lívsleiðini, sum vit øll koma til um okkum unnist lívið, ein hurð verður latin aftur vit hava nátt aldursmarkið verður sagt og hvat so? Vónandi hava vit øll tá hurðar, sum standa opnar inn í ein ríkan og meiningsfyltan pensiónsaldur, her henda tíbetur nógv góð og positiv tilboð til pansionistarnar.

Tosa verður í hesum døgum nógv um eitt visiónstorg, sum verður sett á skinnarin skal koyra samfelagið Føroyar inn í framtíðina til eina tilverðu, sum er óbeskriviliga deilig verður sagt, í einum togi eru nógvar kupegir har tann ferðandi kann njóta ferðina ella keða seg, fólk stíga av og fólk koma uppí, øll hava eitt steðgið pláss, sum tey síggja fram ímótir. Vónandi koma vit Føroyingar ikki at missa okkara lívsvirðir á ferðinini inn í framtíðina, kemur familian Føroyar at hava tað eins gott og vit hava tað í dag ? Góða ferð víðari ynskist øllum við Harrans ríku signing inn í framtíðina.